# Eksklusivhandil ein diskriminatión

## - At lata ein eksklusivhandil upp í SMS við whiskey-, cognac- og vínsløgum er ein diskriminatión móti øli, sum bæði er ein góð og bílig framleiðsla, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór

Leo Poulsen

Rúsan skal tjena 1,6 milliónir meir, enn framskrivingarnar higartil vísa, fyri at kunna liva upp til avlopskravið, sum ásett er í fíggjarlógini. Og ein liður í hesi meirinntøku skal koma frá einum eksklusivhandli í SMS.

Sambært stjóranum í Rúsdrekkasølu Landsins, Elsu Mariu Olsen, skal hesin handilin selja »betri dropar«, enn framman undan fáast í sølustøðum hjá Rúsuni kring landið.

Serliga verður hugsað um fínaru sløgini av whiskey, cognac og so meiri eksklusivu vínsløgini.

Hartil skal handilin í SMS eisini selja ymsar lutir, sum hava við vøruúrvalið hjá Rúsuni at gera, eitt nú vínopnarar og whiskey-, cognac- og víngløs.

Øl kann í minni mun býtast upp í betri og dýrari dropar, og verður tískil ikki ein partur av vøruútboðinum í handlinum í SMS. Og tað hóvar Einar Waag, stjóra í Føroya Bjór, illa.

– Eg haldi, at tað er ein beinleiðis diskriminatión móti einari bæði góðari og bíligari framleiðslu. Tað er staðfest, at sølan av øli er minkað 10% higartil í ár, og við at Rúsan leggur meira vinning á føroyska ølið fer neyvan at betra um ta støðuna, sigur Einar Waag.

### Óskiljandi

Stjórin á Føroya Bjór sigur, at tey fyri einari viku síðani ella so fingu brævfrá Rúsdrekkasølu Landsins har boðað varð frá, at sum ein liður í at liva upp til avlopskravið á fíggjarlógini vóru 50 oyru løgd á hvørja fløsku av føroyskum øli, ið selt verður í Rúsuni.

– Tað ger ikki tann stóra munin og merkir bara, at vit tjena eitt sindur meira upp á fløskuna. Vit fara eisini at leggja hesa somu prís-hækking á ølið, sum vit selja frá okkara egnu goymslum, sigur Einar Waag.

Men hann – eins og flestu aðrir føroyingar – undrast stórliga á politikkin, sum verður førdur á rúsdrekkaøkinum.

– Tað er totalt ólogiskt, at Rúsdrekkasøla Landsins skal liggja undir einum risastórum avlopskravi, samstundis sum almenni rúsdrekkapolitikkurin miðar ímóti at tálma nýtsluni, sigur Einar Waag.

Hann heldur annars, at rúsdrekkanýtslan í Føroyum í heila taki er minkandi.

– Eg haldi tað skyldast kreppuni. Tað er nústaðni gingið upp fyri føroyingum, at ein kreppa hevur rakt landið, og tað er hetta, sum nú merkist aftur á søluni av rúsdrekka í Føroyum, sigur Einar Waag.



*Einar Waag heldur tað vera diskriminerandi, at eksklusivhandilin í SMS ikki skal selja øl*

# Gongur beint móti endamálinum

## – Tað er tann øvugta verð at seta meira upp á tey veikaru sløgini, og eg haldi ikki tað vera nakra orsøk at lata ein luksushandikl upp í SMS, tí vit hava longu framman undan luksusprísir, sigur Óli Hansen, nevndarformaður í Okkara

Leo Poulsen

Eins og stjórin á Føroya Bjór undrast eisini nevndarformaðurin í hinum føroyska bryggjarínum, Okkara, Óli Hansen, á, at lagt verður oman á veikastu sløgini innan rúsdrekka.

– Tað gongur jú beint ímóti rúsdrekkapolitikkinum, sum miðar ímóti at tálma nýtsluni, sigur Óli Hansen.

Hann sigur, at príshækkingin sjálvandi kann koma at ávirka søluna hjá Okkara.

– Vit kappast í nógv størri mun móti útlendka ølinum, tí vit tappa í dunkar, og tí má roknast við, at príshækkingin í størri mun fer at raka okkum, sigur Óli Hansen.




*Óli Hansen heldur, at Okkara í størri mun verður rakt av príshækkanini, tí teir við sínum dunkaøli í størri mun kappast móti donsku bryggjaríunum*

Hinvegin hevur hann stórt álit á, at Okkara fer at standa seg í kappingini.

- Eg meti, at vit framleiða eina so høga góðsku, at tað fer at síggjast aftur í kappingini móti danska ølinum, sigur nevndarformaðurin.

Okkara hevur ikki – eins og Føroyar Bjór – egnar goymslur, og tí er Rúsan næstan einasti kundi hjá bryggjaríinum, burtursæð frá matstovum og skeinkingarstøðum.

– Eg haldi tað vera harmiligt, at kundarnir ikki kunnu merkja á prísinum eisini, at tað er føroysk framleiðsla teir keypa. Tað gera teir til dømis, tá teir keypa mjólk, sigur Óli Hansen.

### Luksusdrankarar

Hann er bangin fyri, at við at leggja oman á prísin á veikaru sløgunum er vandi fyri, at vit enda afturi í tíðini, tá fólk keyptu tað, sum gav mest prosent fyri pengarnar.

– Fyrr var tað jú soleiðis, at tú bílegði finspritt og elefantøl, og við at leggja oman á ølprísin, verður skumpað aftur á tað borðið, sigur Óli Hansen.

Hann heldur eisini, at við at lata luksushandil upp í SMS, verður róð upp undir at býta føroyingar upp í tvinnar bólkar: luksusdrekkarar og pappvínsdrekarar.

– Eg haldi ikki tað er neyðugt at lata ein luksushandil upp í SMS, tí vit hava longu sum er luksusprísir á rúsdrekka, sigur Óli Hansen.

Eins og flestu onnur skilir hann ikki tvíeggjaða svørið, sum Rúsdrekkasøla Landsins arbeiðir eftir.

- Samstundis, sum sølan skal virka tálmandi, skal hon eisini vísa eitt risa avlop, og tað er undarligt, at eingin hevur hug at gera nakað við tað, heldur Óli Hansen, nevndarformaður í Okkara.